Framtí›in er so nær, tá tú er gamal

– Eg hugsi ikki so langt fram, kanska um morgindagin, men so heldur ikki longur, ta› nyttar onki, tá man er so gamal, sigur søldfir›ingurin Adolf Olsen, sum t‡sdagin fyllir 90 ár

SAMRØ‹A
Jústinus Leivsson Eidesgaard

Adolf Olsen er lættur í sinni og dugir væl at sita undir or›inum *Mynd: Jens K. Vang*

Einkjuma›urin um sorg: »Sí›an eg var heilt ungur havi eg lagt lívi› í guds hendur. Konan Lotta doy›i fyri f‡ra árum sí›an. Eg vil ikki kalla okkara skilna fyri sorg, heldur sakn. Vit tosa›u mangan um, hvør av okkum fór fyrst heim. Eg veit hvar hon er farin og ta› ber ikki til at tosa um miss, tá eg veit hvar hon eg havi mist er. Hevur tú mist naka›, so er ta› burtur. Ta› hongur líka sum ikki saman at tosa um at missa, tá ein tr‡r og leggur lívi› í Guds hendur.«

Eysturoyar Ellis og Røktarheim hósmorgun. Langar rø›ir av fínum bilum standa uttanfyri hetta arkitekttekna›a heim, sum er umhugsa› í minsta smálut. Flagtekja og svartur klædningur hevjar seg yvir asfalti› og Skálafjør›urin liggur veldugur og vakur í baks‡ni. Omanfyri er hagi og hur›arnar fara upp, uttan at tú tekur í klinkuna. Alt hetta vælhildna er karmurin kring heimi hjá teim gomlu í Eysturoynni, summi heilt frísk, onnur boygd av elli og mangan vánaligari heilsu.

Inni sita gomul fólk í koyristóli, nosslig og vælpleyga› og aftanfyri sjongrar Elis í útvarpinum. Ta› er upp undir døgur›a og heilivágur ver›ur fyltur upp í gløs. Starvsfólk tita kvikliga aftur og fram, tey heilsa blídliga.

T‡sdagin fyllir eitt av búfólkunum 90 ár. Ta› er Adolf Olsen úr Søldarfir›i og vit hava sett honum stevnu í dag.

Adolf situr prú›ur og vælbygdur frammanfyri skrivibor›i› í kamari sínum. Hann sær 20 ár yngri úr enn hann í veruleikanum er. Eyguni eru blonk og klárn og hann situr í n‡stroknari skjúrtu og tekur í móti.

– Ja, her er gott pláss, her er gott at vera og nógv av plássi er eisini aftanfyri brósti›, sigur hann og peikar á gongina, wc og klædnaskápini.

– Higartil eri eg heilt sloppin undan fjølmi›lunum, hóast eg bæ›i havi fylt sjeyti og átttati, sjeytifimm og áttatifimm. Og Argemenninir hava heldur ikki veri› eftir mær enn. Mær dámar heldur ikki jubileum. Eg var forma›ur fyri missiónshúsinum í Søldarfir›i í 23 ár. Eg bar meg undan, tá ta› nærka›ist 25. Men annars vælkomin, eg kenni fólki›, tú er av, sigur Adolf Olsen.

Hann nemur eisini í samrø›uni vi› álvarsemi› í lívinum

Mynd: Jens K. Vang

Framtí›in er so nær

Hvat hugsar eitt menniskja, sum hevur liva› eitt so langt lív sum Adolf. Hvat hugsar ta› um framtí›ina. Adolf svarar skjótt.

– Eg haldi slett ikki, at eg hugsi um framtí›ina longur. Nú er so langt rógvi›. Eg hugsi um morgindagin, men so heldur ikki longur. Ta› nyttar einki, tá ein er so gamal. Eg havi altí› havt gó›a heilsu, men eg veit ikki, havi ikki rættuliga brúk fyri heilsuni longur. Eg havi veri› heppin onganti› plága›ur av ringari sjúku. Jú einafer› fyri mongum árum sí›an. Eg roykti illa sum ungur, men so fór eg at hosta nógv og tá leg›i eg tubbaki› á hillina, ta› hjálpti beinanvegin. Men eg skal ikki gera ta› til einki, at leggja av, ta› var sera ringt, sigur Adolf Olsen.

Elli og einsemi og barndømi

– Tá er gerst gamal, so hevur tú tann trupulleika, at tú er elst næstan alla tí›ina. Ja, tú er partvís einsamallur, tí næstan øll, sum gingu undan í tínum lívi eru farin. Ta› er so tunt rundanum teg. Eg haldi, at eg eri eitt sindur í ørviti vi›hvørt, men eg veri helst tann seinasti, sum fái ta› at vita. Eg haldi, at eg eri í ørviti og royni at bakka meg burtur úr ørvitisskapinum og sum regul, so eydnast ta›. Eg missi í heilum dagaskil, men nú havi eg fingi› mær ein kalendara á bor›i›. so nú er lættari at fylgja vi›, sigur Adolf Olsen.

– Eg undrist mangan á hvussu væl Gud hevur tilrættalagt alt í lívinum. Heilt frá ungum árum hava eg og konan Lotta, slekta› úr Rituvík, lagt okkara lív í Guds hendur. Og eg kenni í dag, at hann gevur mær ta› eg havi brúk fyri til hvønn dagin eg fái frá honum Eitt nú hevur ta› jør›iska minni og minni t‡dning sum eg eldist. Lotta doy›i fyri f‡ra árum sí›an. Saknurin er stórur, men eg vil ikki kalla ta› sorg. Eg veit hvar hon er og tá eg veit ta›, so havi eg heldur ikki mist hana. Eg veit eisini, at ta› ver›ur ikki so leingi til vit síggjast aftur. Ta› er trygt at liva í slíkari vissu.

Grundaskemt

Grundamenninir í Søldarfir›i eru tiltiknir skemtiligir, men Adolf heldur ikki, at so hevur veri› frá gamlari tí›.

– Foreldini hjá mær vóru Jóan Jakku Olsen úr Søldarfir›i og Malena Olsen, ætta› av Toftum, tey vóru álvarsom fólk. Men vit, børnini, hava havt lætt sinni. Serliga Sámal Petur bró›ur. Pápi var giftur tvær fer›ir Sámal Petur og eg vóru hálvbeiggjar. Jú, ta› kundi vera skemtiligt í Søldarfir›i.

Ikki á val

Nú vit tosa um Grundaskemt, so ætlar Adolf sær fyri fyrstu fer› í lívinum ikki á væl t‡sdagin, dagurin hann rundar níti.

– Í Dimmalætting havi eg onkuntí› lisi› brigsl, at sambandsmenn hava næstan grivi› dey› uppaftur fyri at fáa tey at stemma, ta› skal ikki vera í mínum føri, sigur Adolf Olsen.

– Eg veri› í Søldarfir›i fø›ingardagin. Eg fari helst inn sunnudagin og um Gud vil so veri eg einar tveir dagar aftaná fø›ingardagin í Søldarfir›i. Eg sigi sum ein fuglfir›ingur. Næst eftir himmiríki, so er ellis og røktarheimi, her er gott at vera fyri ein gamlan mann, sum kanska ein part av degnum bí›ar eitt sindur eftir tí sum liggur fyri framman, sigur Adolf Olsen.

Sjóma›ur og húsasmi›ur

Adolf Olsen sigldi í 30 ár. Hann sigldi fyrst vi› slupp og sí›an vi› trolara.

– Skálafjør›urin er sildapláss og sum heilt ungur lærdi eg at bøta net. Hetta kom mær til gó›ar umbor› á trolara. Eg sigldi í 10 ár vi› ymiskum føroyskum trolarum. Sí›an leg›ist eg uppi, fór fyrst at stoypa hús og seinni eisini at smí›a tey li›ug, sigur hann

– Eina løgna hending minnist eg, tá eg sigldi. Eg var einafer› vi› at føra tveir dey›ar føroyingar heim úr Noregi. Annar var úr Hesti og hann var komin so illa til ska›a umbor› á einum skipi í Noregi, at hann doy›i á heimferi›ni. Hin var úr Fuglafir›i, og hann var av allar bestu svimjarum. Hann var farin saman vi› ø›rum at svimja í einum vatni i Norego og har drukna›i hann. sigur Adolf Olsen.

Vit ynskja Adolfi tillukku vi› degnum.

NÝGGJ FLØGA FRÁ
BACKSTREET BOYS

í 3-aranum
frá 20. november

- altíð fyrst við tí nýggjasta tónleikinum...

3arin

SMS · Tel. 353535 · Fax 353536 · E-mail: tryarin@post.olivant.fo